## Vieira verður verandi

Søgur hava leingi gingið um, at Patrick Vieira skuldi vera á veg til Arsenal aftur, men sambært Sky Sports hevur royndi miðvallarleikarin gjørt av at verða verandi í Inter. Vieira hevur verið nógv frammi í miðlunum, og bæði Tottenham og Arsenal hava verið áhugað í at fáa fronsku stjørnuna í sín hóp. Vieira vi lógvuliga fegin við til HM komandi ár í Supurafrika, og fyri at sleppa tað, er neyðugt við støðugari spælitíð, nakað hann ikki kundi vera vísur í í Inter. Nú hevur hann kortini gjørt av at halda fram í italienska felagnum og royna at hjálpa Inter at vinna fimta meistaraheitið á rað.




## Fyrsta liðið víðari

Carling Cup steypakappingin fyri ensku league-feløgini byrjaði við einum dysti í gjárkvøldið. Darlington úr League 2 tók heima ímóti fyrrverandi stórliðnum, Leeds United, sum í dag spælir í League 1. Darlington slapp við neyð og deyð undan húsagangi, og hevur skift alt liðið út. Allir leikarar eru komnir til á »free transfers«. Tað er Colin Todd, sum er venjari har nú. Men hóast heimavøll gjørdist Leeds ov stórur biti fyri Darlington, sum mátti lúta fyri einum Enoch Showunmi málið eftir umleið einum tíma spæli. Stjørnuáleyparin hjá Leeds, Jermaine Beckford, var skaddur og tí ikki við í dystinum.

# Ikki high-risk dystur



*Løgreglan verður sum vant til staðar til landsdystin á Tórsvølli í annaðkvøld*

**Løgreglan verður til staðar á Tórsvølli í annaðkvøld sum til aðrar landsdystir, men tað er ikki talan um ein high-risk dyst, sigur Martin Berg frá løgregluni**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Sjálvandi verður løgreglan á Tórsvølli í annaðkvøld. Tað er hon til allar landsdystir, og dysturin í móti Fraklandi mikukvøldið verður einki undantak í so máta.

Talan verður tó ikki um nakran high-risk dyst, sum vit onkuntíð hava havt í Føroyum.

– Vit hava gjørt okkara metingar og kanningar í samráð við Fótbóltssambandið, UEFA og FIFA. Og út frá hesum eru vit komin fram til, at talan verður ikki um nakran high-risk dyst, sigur Martin Berg frá løgregluni í Havn.

Hetta var eisini støðan, tá Fraklandi var í Føroyum í 2007.

Martin Berg vísir á, at tað eru krøv um trygd og annað, ið skulu uppfyllast og hetta verður gjørt. Millum annað fáa teir at vita, at hvussu nógvir áskoðarar koma og eisini, um hooligans eru millum teirra.

Um fronsku áskoðararnar hevur løgreglan í Havn frætt, at teir vera um 40 í tali, og at tann er um friðarlig fólk.

### Spælir altíð væl av

Tá Týskland vitjaði í Føroyum í juni 2003 var hetta ein high-risk dystur. Tá bað føroyska løgreglan um hjálp úr Danmark, sum sendi 60 løgreglumenn til Føroya.

Orsøkin var, at løgreglan í metingum av dystinum og umstøðunum av annars vóru komin fram til, at vandin fyri ófriði ikki var lítil, tá eini 50 hooligans vóru partur av týsku áskoðarafjøldini.

Eisini tá Brøndby vitjaði í Føroyum í fjør, tá hesir spældi í móti B36, og tá Manchester City spældi móti EB/Streymi, fekk løgreglan hjálp úr Danmark, men í øllum førum spældi alt væl av.

## Franski hópurin

**Málverjar:**
Cédric Carrasso, FCG Bordeaux
Hugo Lloris, Olympique Lyonnais
Stéve Mandanda, Olympique de Marseille

**Verjuleikarar:**
Erik Abidal, FC Barcelona
Julien Escude, FC Sevilla
Patrice Evra, Manchester United
Rod Fanni, Stade Rennais FC
William Gallas, Arsenal FC
Bakary Sagna, Arsenal FC
Sébastien Squillaci, FC Sevilla

**Miðvallarar:**
Alou Diarra, Girondins de Bordeaux
Lassana Diarra, Real Madrid
Yoann Gourcuff, Girondis de Bordeaux
Florent Malouda, Chelsea FC
Moussa Sissoko, Toulouse FC
Jéremy Toulalan, Olympique Lyonnais

**Framherjar:**
Nicolas Anelka, Chelsea FC
Karin Benzema, Real Madrid
André-Pierre Gignac, Toulouse FC
Thierry Henry, FC Barcelona (skaddur)
Loic Remy Ogc, Nice
Franck Ribery, Bayern München (skaddur)

## Føroyski hópurin

**Málverjar:**
Jákup Mikkelsen, KÍ
Gunnar Nielsen, Manchester City

**Verjuleikarar:**
Egil á Bø, EB/Streymur
Jóhan Troest Davidsen, NSÍ
Bartal Eliasen, ÍF
Atli Gregersen, Víkingur
Einar Tróndargjógv Hansen, NSÍ
Jónas Þór Næs, Hvidovre
Niclas Niclasen, Víkingur
Fróði Benjaminsen, HB

**Miðvallarar:**
Jákup á Borg, B36
Atli Danielsen, KÍ
Bogi Løkin, NSÍ
Súni Olsen, Víkingur
Jann Ingi Petersen, NSÍ
Símun Samuelsen, Keflavík
Høgni Zachariassen, ÍF
Hjalgrím Elttør, KÍ

**Áleyparar:**
Jóan Símun Edmundsson, B68
Arnbjørn Hansen, EB/Streymur
Christian Lamhauge Holst, Silkeborg
Christian Høgni Jacobsen, NSÍ

# Súsanna danskur meistari

**Sunnudagin gjørdist Súsanna Skylv Sørensen danskur meistari á hálva ironman-teininum, tá kappast var í jútska býnum, Juelsminde**

ÍTRÓTTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Talan er um eina rættiliga harða og kropsliga krevjandi kapping, tí tey íðkandi skulu fyrst svimja 1,9 kilometrar, síðani súkkla 90 kilometrar og at enda renna 21,1 kilometur. Tað er ikki av ongum, at tvífaldi teinurin av hesum hevur heitið ironman ella »jarnmaður«.

Kappingin sunnudagin fór fyri tað mesta fram í og kring havnarlagið í Juelsminde, og tá avtornaði, var Súsanna Skylv Sørensen fremst í kappingini hjá kvinnunum við tíðini fýra tímar, 37 minuttir og 12 sekund.

– Hóast hetta bæði var ein kapping og ein venjing, vildi eg gjarna vinna og fór tí eftir gullinum. Tað eydnaðist eisini, hóast kappingin hesa ferð ikki gekk av tí allarbesta. Nú ætli eg mær at gera meira um meg, og eitt nú ætli eg mær at satsa uppá at sleppa á danska landsliðið, sigur hon.

Súsanna, sum í kappingini í Juelsminde umboðaði Føroya Triathlon Felag, vann fyri einum góðum mánaði síðani silvur í 10.000 metra renning á Oyggjaleikunum í Álandi, umframt at hon í súkklukappingini Statoil Kring Føroyar í farna mánaði vann hjá kvinnunum. Eisini er hon ráðandi føroyameistari í triathlon.